## DAGSINS MEINING

# Alment monopol og kappingaravlaging

Í gjár samtykti løgtingið við aðru viðgerð kringvarpslógina. Hóast talan er um eina tiltrongda lóg, sum vit hava bíðað eftir leingi - eisini í spenningi, so var tað kortini harmuligt at staðfesta, at mentanarnevnd løgtingsins hevur broytt upprunauppskotið soleiðis, at Kringvarp Føroya beinleiðis kann fara í kapping við privatar miðlar - *á ójøvnum føti!* Hetta kann Kringvarp Føroya, tí løgtingið hevur samtykt, at stovnurin skal sleppa at senda útlendskar public service rásir, sum t. d. DR1, DR2, Nrk o. s. fr.

Hetta er ein rættuliga prinsippiellur spurningur fyri føroysku fjølmiðlarnar, sum virka reint kommersielt - uttan nakran form fyri almennan stuðul. Hetta stig løgtingsins er beinleiðis kappingaravlagandi - og er rættuliga týðuliga gjørt í óðum verki, uttan at t. d. Televarpið, sum beinleiðis verður rakt av hesum, er eftirspurt. Spurningurin varð eisini reistur undir tingviðgerðini, um Kappingarráðið kann góðtaka slíkt - men hann varð ikki svaraður.

Tað er kortini eitt framstig, at lógarsmiðir okkara umsíðir hava tikið støðu til lýsingarpolitikkin hjá almenna kringvarpinum. Sum støðan er í dag, so er ein sera ójøvn kapping her millum almenna kringvarpið og privatu miðlarnar. Kringvarpið, sum er alment fíggjað, og sum við pantifúta kann fara eftir kringvarpsskattinum, eigur ikki eisini at verða lýsingar- og sponsorfíggjað. Tað er hvørki gott fyri stovnin - ella fyri kappingina millum miðlarnar.

Tað setir eisini politikarunum krøv, at Kringvarpið missir hesa inntøku næstu fimm árini. Tað verður áhugavert at frætta, hvussu hesir pengar skulu fáast til vega - um kringvarpsskatturin hækkar, ella játtan verður á løgtingsfíggjarlógini.

Hetta stigið hjá løgtinginum við at lata Kringvarpið senda útlendskar rásir, víðkar almenna monopolið, og tað tekur grundarlagið undan undan privatum miðlum. Tað er als ikki uppgávan hjá Kringvarpi Føroya at senda public service tilfar hjá øðrum londum, Uppgávan er at senda føroyskt public service tilfar. Hóast tað er at fegnast um, at ein so breið politisk semja er gjørd um hetta mál, so er júst hetta stigið illa umhugsað - og átti at verði broytt.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Enn meira svik – Annita!

**POUL MICHELSEN**
løgtingsmaður



Eg havi lisið viðmerkingarnar hjá Annitu á Fríðriksmørk í samband við dupultleikin hjá tjóðveldismanningini í málinum um skúladepilin í Marknagili.

Eg skilji væl at Annita er frustrerað. Frustratiónir í Tjóveldisflokkinum var júst heitið á greinini hjá mær í samband við svik Tjóðveldisfloksins mótvegis skúladeplinum.

Men Annita! Tað skerst ikki burtur, at tveir framstandandi tjóðveldistingmenn – harav tann eini valdur í Suðurstreymi – alment bæði upp á skrift og í talu hava beint tekniska skúla í Havn til Klaksvíkar.

Eg havi loyvt mær at taka hetta álop Tjóveldisfloksins á skúladepilsætlanina í Marknagili í ramasta álvara. Allir tingmenn vita, hvussu viðbrekið málið um skúladepilin í Marknagili er, og at einhvør semja í hesum málið er veik og løtt at telva í spønir.

Tað, sum eg vildi við grein míni, var:

- *at takka samgonguni fyri ta semju vit hava funnið*
- *at vísa á at »alt ella onki politikkurin« hevur nærum kvalt yrkisútbúgvingarnar í Havn*
- *at harmast um, at Tjóðveldisflokkurin spælir dupultspæl í skúladepilsmálinum*

Eg skilji væl, at Annita roynir at sláa alt upp í glens og soleiðis sløra veruleikan í málinum – eg eri tó ikki vísur í, at Annita heldur hetta vera serliga skemtiligt. Mitt í øllum bjóðar Annita at leggja høvur sítt á blokkin sum trygd fyri, at Tjóðveldisflokkurin stendur aftan fyri Skúladepilin í Marknagili.

Men Annita, eg hevði ynskt, at henda trygdin var til staðar, tá hon gjørdi munin – hon telur bara ikki eins nógv, nú samgongan – uttan hjálp frá Tjóðveldisflokkinum - er komin undir land við eini semju í málinum.

Tjóðveldisflokkurin er heilt einkult kroystur at atkvøða fyri málinum.

Eg kann tó bara fegnast um, at Tjóðveldisflokkurin (íroknað Tobba og Finn) gongur í seg sjálvan og tekur undir við málinum soleiðis, sum tað nú fyriliggur.

### Enn meira svik

Nú málið kemur aftur úr mentunarnevndini sæst, at Tjóðveldisflokkurin hevur lagt á annan bógv í eini nýggjari roynd at forkoma skúlaætlanini. Nú eitur tað seg, at skúladepilsætlanin er fíggjarliga óforsvarlig.

Raslað verður við øllum vápnum. 80-ini verða grivin fram aftur, stuðul til fiskivinnuna, manglandi gjøgnumskygni og búskaparligt forderv, og eg veit ikki hvat. Álvartos, hvar eru vit?

Lógin, sum er ætlað at fíggja sjálveigandi vinnuskúlar og sum verður brúkt í hesum føri, fær av at vita.

Lógin er nr 106 frá 1998. Um vit kaga í lógartekstin og viðmerkingar til lógina so sæst, at hon er sera greið.

Lógin er gjørd til handilsskúlan og teknisku skúlarnar í Havn og Klaksvík og er m. a. ætlað at nýbyggja og umbyggja nevndu skúlar. Lógin lýsir, hvussu sjálvseigandi vinnuskúlarnir skulu stjórnast og eisini heilt greitt, hvussu fíggingin skal útvegast, tá byggjast skal.

Nú kundi ein fingið tá fatan, at tað eru vit fólkafloksmenn, sum hava hálað henda fíggingarleistin burtur úr reyvalummanum.

Lógin, er sum nevnt frá 1998 og er nr 106. Hon er løgd fram av Signari á Brúnni, tjóðveldislandsstýrismanni í mentamálum í november 1998 og vælsignað av Karsteni Hansen tjóðveldislandsstýrismanni í fíggjarmálum um somu tíð.

Hon bleiv samtykt á tingið 22. december, 1998 við 26 atkvøðum fyri og ongari ímóti. Lógin kom í gildi 1. januar 1999.

Tekur dupultspæl og svikalótir Tjóðveldisfloksins ongan enda í hesum málið ?

### Hovstunnilin

Bert ein lítil heilsan til Annitu her loksins. Lógin um vinnuskúlar er sera greið, fíggingarleisturin er greiður og lógin stríðir ikki ímóti nakrari játtanarskipan.

At brúka partafelagslógina til at byggja Hovstunnilin var hinvegin í stríð við alla lóggávu og siðvenju innan alt partafelagsvirksemi

Fari at ynskja tekniska skúla og handlisskúlanum tillukku og øll góð ynskir framyvir og vóna at lógin um at byggja skúladepilin í Marknagili verður til gagns fyri allan skúlaungdómin í Føroyum.

# Maskinmeistarar: Vilja aftur í gamla skúlan

**FELAGIÐ MASKINMEISTARALÆRARAR**
Yvirlýsing:

Aðalfundurin heitir á leiðslu skúlans og Mentamálaráðið at flyta undirvísingina til maskinmeistaraprógv niðan aftur í bygningin undir Krákugjógv innan 1. august 2006.

Vit halda ikki at umstøðurnar hjá teimum lesandi eru nóg góðar í Nóatúni í mun til tær frálíku umstøður, sum vit høvdu áðrenn flytingina í august 2005.

Vit heita eisini á landsstýrismannin í mentamálum at svara okkum upp á teir fýra spurningarnar í opna brævinum, dagf. 23. februar 2006.



*savnsmynd*

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónssekreterur:**
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.